Posthúsið á Toftum hevur stóran týdning

- Tað er ikki neyðturviliga talið av viðskiftafólki sum sigur, hvussu stórur tørvurin á einum posthúsi er, sigur Alfred Olsen

- Eitt av teimum stóru virkjunum á Toftum rindar millum 200.000 og 250.000 krónur í postgjøldum um árið, sigur Alfred Olsen, løgtingsmaður

POSTVIRKSEMI
Vilmund Jacobsen

Tað var postverkstjórin, Bergur í Garði, sum avgjørdi, at posthúsið á Toftum skuldi lata aftur, hósdagin 24. apríl. Men nú hevur so landsstýrismaðurin, Bjarni Djurholm, sum ikki visti av hesi ætlan, avgjørt fyribils at annulera avgerðina hjá postverkstjóranum.

Mótmæltu

Tá ið tað frættist, at dagurin var ásettur, tá ið posthúsið á Toftum skuldi lata aftur, tóku fólk í Nes kommunu seg saman og settu hart ímóti hørðum. Út við 500 undirskriftir vórðu savnaðar, sum mótmæli ímóti hesi ætlan. Øll, sum skrivaðu undir, búgva í Nes kommunu og eru yvir 18 ár.

Alfred Olsen, løgtingsmaður, fegnast um, at landsstýrismaðurin nú hevur annulerað avgerðina hjá postverkstjóranum.

Saman við fólki í Nes kommunu sum heild, heldur løgtingsmaðurin tað vera burtur við at lata posthúsið á Toftum aftur, tí tørvur er á teirri tænastu, sum posthúsið veitir.

- Afturlatingin er nú útsett, men enn veit eingin, hvør endaliga avgerðin verður. Fyrst í komandi viku fer landsstýrismaðurin at tosa við Berg í Garði, sum hevur verið burturstaddur, um málið. Vit vóna, at endaliga avgerðin verður, at posthúsið á Toftum verður verandi opið.

Ikki talið

Alfred sigur, at tað er ikki neyðturviliga er talið av viðskiftafólki, sum sigur, hvussu stórur tørvurin á posthúsinum á Toftum er.

- Her eru nógv virkir, og tey hava sítt samskifti við posthúsið.

Hann vísir á, at tað eina virki rindar millum 200.000 og 250.000 krónur í postgjøldum um árið, og tað er ikki lítið. Onnur virkir rinda einar 5.000-6.000 krónur um mánaðin í postgjøldum.

- Eg haldi, tað hevur gjørt mun, at vit her í kommununi hava "reagerað" og roynt at greitt frá, hvønn týdning posthúsið í veruleikanum hevur, sigur Alfred.

Góð postboð

Løgtingsmaðurin harmast um, at ætlanin er at minka um talið á avgreiðslupostboðum.

- Vit hava nøkur góð postboð, sum kenna viðskiftafólkini. Eins og í øðrum kommunum, búgva eisini gomul fólk her í kommununi, sum ongan møguleika hava at fara á posthús eftir pensjónini, pakkum ella heilivági. Nú skal tað næstan gerast ólógligt at veita hesa tænastu. Og tað er ógvuliga harmiligt, sigur Alfred Olsen.

Nýggja forkvinnan hjá Javna, Malena Arnholdsdóttir, ætlar at geva arbeiðnum allan armin, sum hon tekur til

Mynd Jens K. Vang

Tey menningartarnaðu fáa okkum at steðga á

Í gjárskvøldið byrjaði landsstevnan hjá Javna, sum endar við stórari veitslu á Hotel Føroyum í kvøld. Vit hava prátað við nýggja formannin, Malenu Arnholdsdóttir. Hon sigur, at tað er ikki av misgávum, at tey menningartarnaðu eru okkara mállum. Tey eru ein náttúrligur partur av lívinum og gera, at vit av og á noyðast at steðga á í jagstranini eftir tí fullkomna

JAVNI
Rúna Sivertsen

Í gjárskvøldið klokkan nítjan setti Høgni Hoydal, landsstýrismaður við mentamálum, landsstevnuna hjá Javna.

Evnið á almenna fundinum var: "Framhaldsskúli til ung við menningartarni".

Í samband við landsstevnuna, fer M'as Blues Band at syngja og spæla í Grasagarði klokkan 11 fyrrapartin í dag. Beata L. Samuelsen fer at halda røðu, og frítíðarklubbin fer at selja bollar og kakao.

Ársveitslan hjá Javna, sum er nakað heilt fyri seg, verður í kvøld á Hotel Føroyum. Gestaroðari verður, Beinta Haraldsen, og M'as Blues Band fara at spæla til dans.

Nýggjur formaður

Á ársaðalfundinum hjá Javna herfyri, varð Malena Arnholdsdóttir á Skála vald til nýggjan formann.

Malena er fødd tann 21. apríl 1952 í Fuglafirði, triðja barnið av seks hjá Steinvør og Arnhold Olsen. Hon eigur 4 børn, Margit, Arnvør, Jákup Petur og Ólav. Ólavur er 18 ár og er menningartarnaður.

Eftir loknan fólkaskúla í 1970, fór Malena á bíbliuskúla í Onglandi og Týskalandi. Í 1976 tók hon útbúgving sum sjúkrasystir á Føroya Sjúkrasystraskúla og arbeiddi á Klaksvíkar sjúkrahúsi.

Árini 1978-80 starvaðist hon sum heimasjúkrasystir í Fuglafirði.

Frá 1987-92 var hon leiðari fyri dagrøktini á Skála.

Seinastu trý árini hevur hon verið næstformaður hjá Javna.

Í løtuni starvast hon á Eyturoyar Røktar- og Ellisheimi, haðani hon hevur fingið farloyvi frá 1. mai.

Allan armin

Malena er sera spent uppá formansstarvið.

- Eg ætli at geva tí allan armin, sigur hon.

Hon ætlar at stríðast fyri, at tey menningartarnaðu verða líka fyri lógini. Hon sigur, at tey, ið bera brek, mugu kompenserast fyri sítt tarn. Hon nevnir dømi við hurðum, ið sjálvar fara upp, tá vit nærkast teimum.

- Ein, ið ikki sjálvur fær latið eina hurð upp, merkir ikki so nógv til sítt tarn, tá hurðin sjálv fer upp. Og verður samafelagið innrættað við hesum í huga, so verður nógv lættari at verða brekaður í Føroyum, sigur hon.

Bústað og arbeiði til øll

Nógv við menningartarni hava einki arbeiði. Tí hava tey einki at fara upp til. Av tí sama, hava tey heldur onga frítíð.

- Vit kunnu ikki siga annað enn, at umstøðurnar hjá teimum menningartarnaðu í dag eru nógv betur enn fyri bert fáum árum síðani. Men tá tað kemur til menningartarn og arbeiði, so er nógv verri statt nú enn fyri 50 árum síðani. Tá vóru øll við í dagliga arbeiðnum, eisini tann, sum bar brek, sigur Malena.

- At hava ein bústað og kunna velja, hvar og hvørjum tú vilt búgva saman við, eigur eisini at vera ein sjálvsagdur rættur hjá teimum, ið bera brek, sigur hon.

Hon sigur eisini, at tað er ógvuliga umráðandi, at tann menningartarnaði sleppur at búleikast í heimliga umhvørvinum.

- Tað er ikki rætt, at tey menningartarnaðu og avvarðandi teirra skulu noyðast at flyta av bygdini, sigur hon.

Uppá gott og ilt

Malena sigur, at tey menningartarnaðu eru eins og øll onnur menniskju uppá gott og ilt. Men tey siga tingini greiðari enn vit, og sjáldan ber til at misskilja, hvat tað er, tey vilja siga okkum.

- Tey menningartarnaðu eru ikki her av misgávum. Tey eru her til at fáa okkum at steðga á í jagstarnini eftir, at alt skal vera "fullkomið". Tey lata eygu okkara upp fyri, hvussu fjølbroyttur lívið í veruleikanum er, sigur nýggja forkvinnan hjá Javna.

Malena Arnholdsdóttir fegnast stórliga um, at løgtingið týsdagin samtykti, at ung við breki eisini skulu hava eitt skúlatilboð.

NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Sjúrður Eliasen 60 ár

Flaggdagin 25. apríl fylti Sjúrður Eliasen, borgarstjóri í Leirvík, 60 ár. Sjúrður er føddur og uppvaksin í Leirvík. Foreldrini vóru Jóna og Hilmar Eliasen. Sjúrður fór til skips í 1957 við Sigatindi, og lívsstarv hansara kom at vera á sjónum. Hann sigldi nógv við føroyskum og norskum línubátum. Hann tók skiparaprógv í 1964. Frá seinast í sekstiárunum til í dag hevur hann verið útróðrarmaður. Hann keypti 50-tons útróðrarbátin Morit í sjeytiárunum saman við verfaðir sínum Olhard. Hendan bátin høvdu teir í ellivu ár, seinni keypti hann sær ein minni bát. Í dag hevur hann bátin Súluna. Sjúrður hevur konu úr Leirvík, Jastrid. Hon er dóttir Malfrid og Olhard Lervig. Tey fingu børnini Hjalta, Morit og Sonju. Sjúrður situr nú á triðja skeiði sum borgarstjóri í Leirvík, eitt starv ið hann hevur røkt til lítar. Sjúrður heldur føðingardagin hjá dóttrini Morit í Danmark. Vit eru mong , ið ynskja tær við familju hjartaliga tillukku við degnum.

Ó.H.

Hans Jacob Hansen

20. mars 1928 – 21. apríl 2003

Mánadagin 21. apríl andaðist Hans Jacob Hansen, vanliga nevndur Hans Jacob á Brúnni, í Fuglafirði, 75 ára gamal. Hans Jacob var úr Fuglafirði, sonur Petru og Hans Jacob Hansen, á Brúnni. Bæði hann og pápin blivu nevndir Hans Jacob á Brúnni. Hans Jacob var ein sera fjølbroyttur maður. Hann fór tíðliga at royna seg sum listamálara, og var hann fyrsti fuglfirðingur, sum hevði málningaframsýning í Havn. Saman við øðrum tók hann stig til fyrstu Varmakelduframsýningina fyri umleið 30 árum síðan. Hann hevur verið í hornorkestrinum síðan fuglfirðingar byrjaðu at spæla horn, til hann noyddist at gevast, tí eyguni fóru at bila. Tá eyguni fóru at bila, fekk hann sær eina teldu, ið kundi vaksa so mikið um bókstavirnar, at hann sá teir. Hann sá møguleikarnar í hesum tóli og byrjaði at skriva, og skrivaði hann t.d. yrkinga- og stuttsøgusavnið, Á Brúnni. Hans Jacob var eisini ein kendur harmonikuspælari og var við til mong tiltøk í hesum sambandi. Í fleiri ár var hann eisini við í Fólkatónleikara-stevnuni, oftast við egnum løgum og tekstum. Seinnu árini hevur hann eisini verið við til at syngja kingo, m.a. á mentanarstevnuni í Norðurlandahúsinum. Hann hevur spælt nógv sjónleik, og var hann ein av stigtakarunum til Fuglafjarðar Sjónleikarafelag. Minniligasta avrikið hjá honum sum sjónleikari man vera tá hann spældi leiklutin sum Tormóður í filminum Barbara. Hann hevur arbeitt sum fiskimaður og útróðrarmaður og í mong ár sum landari á Havsbrún í Fuglafirði. Hans Jacob giftist við Minu, f. av Vollan av Glyvrum. Tey fingu tey 6 børn, ein son og fimm døtur sum allar búgva í Danmark. Friður veri við minninum um Hans Jacob á Brúnni.

†

Kunngjørt verður at okkara kæri pápabeiggi, svágur og abbabeiggi

Margeir Trønd Hansen
vanliga nevndur Trøndur, Tórshavn

andaðist hósdagin 24. apríl, 59 ára gamal.

Fyri tey avvarðandi
Jón, Sámal, Sigurð og Sólgerð v/ familju

Andlát

14. apríl
Meinhardt Poulsen, Meinhardt í Frammistovu, Hvannasund, 88 ár
Valdemar Jacobsen, Syðradalur, 87 ár

15. apríl
Hilda Jacobsen á Viðareiði, 88 ár

16. apríl
Elsuba Susanna Johansen, ættað úr Kvívík, búsitandi í Hirshals, 76 ár
Petur Davidsen, Haldórsvík, 78 ár
Jóanes Wardum, Havn, 56 ár

18. apríl
Petra Andreassen í Vestmanna, 83 ár

20. apríl
Vinjard Falkvard Joensen, Sandavagi, 57 ár
Dánjal á Nesinum, Sandavágur, 86 ár
Elisabeth Mikkelsen, Tórshavn, 82 ár

21. apríl
Kaj Thomassen, Svínoy, 95 ár
Hans Jacob Hansen, Fuglafjørður, 75 ár

22. apríl
Agnas Hansina Poulsen, Tórshavn, 27 ár
Thomasia Samuelsen, Masa, Froðba, 66 ár

75 ár

Í dag, 26. apríl, fyllir Nicolina Jensen Beder 75 ár. Føðingardagurin verður hildin saman við systkjunum.

Silvurbrúdleyp

Í dag halda Annikka og Poul Færø, Klaksvík, silvurbrúdleyp. Veitslan verður í KÍ-høllini kl. 18.00. Dúgvan siglir eftir veitsluna.

Dagurin

26. apríl. **Cletus**, deyður í umleið ár 90. Cletus ella Anacletus var triði maður í pávastóli eftir Pætur.

27. apríl. **Ánanias**, deyður í 375. Kristin munkur, sum varð tikin av døgum í Persiu. Summir halda, at her er talan um tann Ánanias, sum er umtalaður í Ápostlasøguni 9, 10-19. *Friðrikur Petersen deyður hendan dagin í 1917.*

28. apríl. **Vitalis**, deyður í umleið 171. Rómverskur embætismaður, sum gjørdist kristin og tí varð tikin av døgum.

Føðingar

11. apríl fingu Anna og Brynjálvur Dalsgaard, Sandi, tvíburar. Dótturin var 44 cm long og vigaði 2320 gr, sonurin 47 cm langur og vigaði 1645 gr.

12. apríl fingu Guðrún Bjarnadóttir, Søldarfjørður, og Hallur Bech, Porkeri, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3600 gr.

14. apríl fingu Eydna og Magnus Samuelsen, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 4200 gr.

14. apríl fingu Christina Nolsøe og Klæmint Isaksen, Tórshavn, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 4000 gr.

15. apríl fingu Elsa Maria og Jógvan í Beiti, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 50 cm long og vigaði 3100 gr.

15. apríl fingu Vanja Ejdesgaard og Jónsvein S. Joensen, Kollafirði, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3430 gr.

15. apríl fingu Gunnvá Wardum og Jógvan Kristiansson Glerfoss, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 4000 gr.

15. apríl fingu Poula og René Hansen, Nólsoy, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3350 gr.

15. apríl fingu Esther og Hjalmar Hvítklett, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 4200 gr.

16. apríl fingu Gunnhild Helmsdal og Benjamin Gaasedal, Keypmannahavn, ein son. Hann vigaði 4200 g og var 55 cm til longdar.

16. apríl fingu Tórun Hansen og Hans Andrias (Hassadi) Midjord, Tórshavn, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3600 gr.

17. apríl fingu Elisabeth og Sigmundur Brestisson, Klaksvík ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 4250 gr. Hann eitur Tórálvur.

17. apríl fingu Marita Samson Sigurdardóttir og Jón Joensen, Lamba, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 4050 gr.

18. apríl fingu Sara Johansson, Undenäs í Svoríki, og Eddi Joensen, Vági, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 4150 gr.

18. apríl fingu Ann-Mari B. Mouritsen og Magni V. Mouritsen, Tórshavn, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3550 gr.

19. apríl fingu Andrea Danielsen, Sumba, og Rúni Dam, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3550 gr.

19. apríl fingu Kari Petersen og Delmar Jacobsen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 4100 gr.

19. apríl fingu Heidi Kragesteen og Pól Jakobsen, Argjum, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3800 gr.

19. apríl fingu Sharda Róin Magnussen og Brynleif Pætursson Hansen, Tórshavn, ein son. Hann var 50 cm langur og vigaði 3100 gr.

20. apríl fingu Mariann Poulsen og Brandur Johansen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 55 cm long og vigaði 4400 gr.

21. apríl fingu Hervør Eyðunsdóttir og Rani Nolsøe, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3550 gr.

21. apríl fingu Marin Sigvaldsdóttir og Kristian R. Bláberg, Miðvági, eina dóttur. Hon var 59 cm long og vigaði 4550 gr.

22. apríl fingu Durita Káradóttir, Strendur, og Báraldur J. Joensen, Hvalvík, ein son. Hann var 56 cm langur og vigaði 4190 gr.

22. apríl fingu Jóhanna Joensen og Arni Danielsen, Hoyvík, ein son. Hann var 50 cm langur og vigaði 3900 gr.

23. apríl fingu Sólfrið Christiansen og Rógvi Rasmussen, Skála, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3520 gr.

23. apríl fingu Dagbjørt Sólheim og Oleif Joensen, Saltangará, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3450 gr.

24. apríl fingu Maria og Heri Matras, Klaksvík, ein son. Hann var 51 cm langur og vigaði 3250 gr.